## Mafialeiðari tikin

Løgreglan í suðuramerikanska landinum Venesuela hevur tikið tann 63 ára gamla italiumannin 63-årige Salvatore Miceli, sum sambært italsku myndugleikunum er leiðari fyri teirri illa kendu Cosa Norsta-mafiuni á oynni Sisilia. Micceli varð tikin leygarkvøldið og verður nú sendur til Italia. Har hevur løgreglan leitað eftir honum síðani 2001 í sambandi við fleiri mál um rúsevnahandil. Myndugleikarnir í Venesuela siga, at Salvatore Micceli hevur fingið fleiri skurðviðgerðir í andlitið fyri at fjala sín samleika. Reuters skrivar, at menn frá italsku løgregluni og Interpol vóru við, tá mafialeiðarin bleiv tikin í venesuelska høvuðsstaðnum Caeacas.



# - Gráti ikki um stálið sum fer

**Arni Hansen, sum síðan byrjan hevur verið ein av monnunum aftan fyri Trónd í Gøtu, sigur, at tað er tann menniskjansligi parturin, ið liggur aftanfyri hetta verk, sum hann í fyrsta lagi hugsaði um, tá Tróndur í Gøtu fyri seinastu ferð stevndi út av Gøtuvík seinnapartin fríggjadagin**

FARVÆL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Her er Tróndur í Gøtu fyri seinastu ferð á Gøtuvík. Bátar við monnum, sum hava siglt við skipinum, liggja úti á vánni og siga farvæl – og uppi á landi verður løtan eygleidd við sorgblídni*

*Mynd: Dávur Winther*

Kombineraði pelagiski trolarin og nótaskipið, Tróndur í Gøtu, hevur fyri seinastu ferð stevnt út av Gøtuvík – og hugsandi eisini úr føroyskum sjógvi. Skipið er selt einum russiskum/ kinverskum felag fyri slakar 50 miljónir krónur, sum verður mett at vera hampiligur prísur. Tróndur í Gøtu kom í flotan um miðjan januar 1987 og kostaði tá einar 85 miljónir krónur. Hetta var nógvur peningur í sínari tíð, og tað gekk ikki long tíð, til tað stóð á gomlum nøglum hjá felagnum í Gøtu. Við hegni og hepnari hond millum teir, sum áttu skipið og felagið hjá fiskimonnum, eydnaðist at gera eina avtalu, sum bar í sær, at skipið reið sjógvarnar av sær.

Í nógv ár hevur Tróndur í Gøtu verið eitt stórt aktiv hjá eigarunum, sum upprunaliga vóru 16 í tali, men sum nú eru 11. Nógvir mans hava gjøgnum hesi mongu ár havt sítt livibreyð umborð á hesum skipi, sum nú er farið úr føroyska fiskiskipaflotanum.

Danir siga, at "man skal aldrig sige aldrig...", og man veit jú ongantíð við vissu, hvussu lagnan lagar seg – um skip, sum farin eru úr flotanum, verða at síggja aftur um okkara leiðir ella ikki.

Taka vit ein annan kombineraðan trolara og nótaskip, Høgaberg, sum eisini loysti í Føroyum seinasta fríggjadag – nakað um somu tíð sum Tróndur í Gøtu – er hetta aðru ferð, at hann verður seldur úr Føroyum. Høgaberg hevur nevniliga áður verið heimahoyrandi í Føroyum undir navninum Gullfinnur. Hetta skip er soleiðis tvær ferðir keypt higar til lands – og er nú eisini tvær ferðir selt úr flotanum.

So, man veit av gróðum grundum ongantíð, um skip venda aftur.

Tá Tróndur í Gøtu fór úr Føroyum, vóru fýra írar og fýra føroyingar umborð, og skipari á ferðini til Írlands, har skipið steðgar ávegis til Peru, er John Mikkelsen, ið hevur loyst av sum skipari umborð á pelagiska skipinum.

Hvussu leingi føroyska manningin verður umborð, var ikki vist, tá skipið loysti í Føroyum. Sum skilst, ynskja keypararnir, at føroyingar verða umborð á allari ferðini til Peru, men enn er ikki endaliga gjørt av, um hetta verður so – ella um teir fýra føroyingarnir bara sigla skipið til Írlands.

Tróndur í Gøtu hevur sína søgu, og ein heilur hópur kundi verið sagt um hetta skip og søguna aftanfyri, at henda verkætlan fekst at bera so væl til, sum hon við tíðini kom at gera. Fyri tveimum árum síðan, tá 20 ár vóru liðin, síðan skipið kom í flotan, var stór umrøða í Sosialinum um søguna, sum hongur uppi í hesum skipi.

Hana fara vit at lata liggja hesaferð.

### Ikki stálið...

Tá Tróndu í Gøtu loysti á vestaru bryggju í Havn tíðliga seinnapartin seinasta fríggjadag, stevndi skipið norður á Gøtuvík, har bátar tóku ímóti. Skipið vendi inni á víkini, og bilar og fólk stóðu uppi á bryggjuni og heilsaðu.

Millum teir, sum vóru á báti hendan dagin, var Arni Hansen, ið er ein av høvðsmonnunum aftanfyri hesa í sínari tíð stóru verkætlan, sum 16 mans upprunaliga



*Høgaberg við vestaru bryggju í Havn. Hetta er aðru ferð, hann fer úr føroyska fiskiskipaflotanum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*